EUROPA CUP
DYSTARSKRÁ 4 / 2023

# H71

LEYGARDAG/SUNNUDAG
14.- 15. JANUAR




## EUROPA CUP:

KVINNUR: Leygardagin 14. januar

**KL.18.00: H71- Atletico Guardés**

KVINNUR: Sunnudagin 15. januar

**KL.18.00: Atletico Guardés - H71**

sms SUÐUROYAR SPARIKASSI ARTICON WENZEL.FO BÓNUS INTERSPORT BYGMA TRYGD ADVOKATFELAGIÐ




DJÓNI GAARD, HJÁLPARVENJARI

# EITT SINDUR UM ATLETICO GUARDÉS

Í løtuni liggur Guardés á einum 9. plássið, har tær hava 7 stig eftir 10 dystir. Tær hava spælt fleiri tættar dystir, sum ikki eru koppaðir teirra veg. Guardés er eitt lið, ið spælir sera skjótt. Tær renna stórt sæð allan dystin bæði 1. og 2. bylgju.
í returrenning og verjustøðu eru tær øgiliga intiativ ríkar, og liggja ofta høgt, og royna at stressa álopsleikararnir til at gera villur.
Profilar hjá Guardés, sum man serliga skal halda eygað við eru nr. 5, 14 og 19.

Vit hava havt eina intensa upptakt til har vit hava vant nógv. Nakrir dagar hava verið við dupult venjingum, har vit so hava etið og hugt video millum venjingarnar.
Í verjustøðu hava vit fyrireikað okkum væl uppá teirra spæl við strikuni, sum tær gjarna vilja sleppa at spæla. Vit vilja raðfesta, at tær fáa vongskot.
Í álopinum ætla vit millum annað, at seta nakrar góðar 1v1 støður, har vit skulu vera góðar til at sleppa bóltin víðari til teir møguleikarnar sum uppstanda.
Øll runt um hópin eru sera spent uppá hesa stóru uppgávu ið bíðar, og nú gleða vit okkum at sleppa avstað at spæla.


MECALIA ATLÉTICO GUARDÉS
H71 HOYVIK
EHF EUROPEAN CUP
A SANGRIÑA
1/8 FINAL
IDA E VOLTA
14 E 15 DE XANEIRO
19:00H
XUNTA DE GALICIA
DEPORTE GALEGO
//ABANCA
NON
DEPUTACIÓN PONTEVEDRA
A Guarda


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
Ford
WENZEL.FO


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
Meira enn ein banki

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

Leitar tú?

Leit

FINNUR JUSTINUSSEN

ODDAGREIN

# RISA AVBJÓLÐING



*Kvinnurnar ávegis til Keypmannahavnar og so víðari til Spania.*

So er aftur evropeisk luttøka fyri framman, nú fremsta kvinnulið okkara í sekstandaparts finaluni í EHF Europa Cup kappingini um vikuskiftið leikar ímóti spanska stórfelagnum Atletico Guardés. Spanska liðið er úr Galisia landslutinum har vesturi í Spaniu á markinum við Portugal og vera báðir dystirnir leiktir á útivølli. Fyrri dysturin er leygardagin hin 14. januar og seinri dysturin dagin eftir, sunnudagin hin 15. januar. Hóast hetta er á útivølli og langt av landi skotið, so skuldi økið ikki verið heilt ókent fyri føroyingar, tá gitni havnarbýurin Vigo, har mong føroysk skip millum ár og dag hava avreitt fiskalastir og framt umvælingar, liggur júst norðanfyri. Eisini liggur gitna Camino gongurutan úr Porto í Portugal til Santiago de Campostella í Spania júst ígjøgnum henda sera vakra landslutin Galisia, so tey, ið hava roynt hesa gongu, skuldu kent økið væl. Atletico Guardés er eitt sera sterkt lið og hevur í mong ár kappast frammarlaga í fremstu sponsku kvinnudeildini. Í løtuni liggur liðið sum nr. 9 í heimligu sponsku kappingini og sambært heimasíðu felagsins, so er hetta ikki nøktandi og skyldast m.a., at liðið higartil í kappingini hevur leikt lutfalsliga nógvar dystir á útivølli. Spanska liðið hevur verið væl fyri í undanfarnu dystunum í europeiksu kappingini og hava vunnið allar sera sannførandi og við stórum knúsandi

málmunum. Men líkamikið hvussu formurin á spanska liðinum er, so eru dystirnir fyri H71 – lið okkara eitt ódnartak og er Atletico Guardés helst sterkasta lið H71 higartil hevur møtt í evropeisku luttøku síni seinastu tvey árini.
Mótsatt mótstøðuliðinum, so liggur H71 fremst í heimligu landskappingini og hevur higartil í ár bert mist eitt stig í grundspælinum. Í steypakappingini hevur H71 eisini leikt seg víðar til semifinalurnar uttan at missa nakað stig yvirhøvur. So forminum hjá liði okkara bilar ikki. Venjaratoymið hjá fremsta liði hjá kvinnum okkara, er um jólahalguna skift út og standa Simon & Djóni, ið vanliga eru venjarar hjá fremsta liði hjá monnunum, nú eisini við endan sum venjaratoymi fyri kvinnurnar. Vónandi styrkir hetta enn meiri um hópin og lyftir hann upp á tað støðið, ið krevst, skulu vit hava møguleika fyri at skala spanska mótstøðuliði okkara. Sum skilst eru allir leikarar okkara tøkir til dystin og skuldi alt soleiðis verið klárt og í lagi til at leggja alt fyri í Galisiu um vikuskiftið og vónandi - tá av hasar og krútroykurin frá dystunum hevur lagt seg – standa eftir sum sigursharrar við atgongumerkjunum til víðari luttøku í áttanadaparts - finaluni í EHF europa Cup kappingini.
Liðið fer úr Føroyum hósdagin undan dystinum og væntast aftur mánadagin. Faldarin ynskir hópinum góðan túr og bestu eydnu til dystirnar.



*H71 kvinnur í Europa Cup dysti.*

NORÐOYA SPARIKASSI

# Grøntbústaðarlán

Hevur tú bústað við grønari orkuskipan, t.d. jarðhita, fjarhita ella hitapumpu, er Grøna bústaðarlánið ein góð og bílig loysn.

Við Grøna bústaðarláninum fært tú lægri rentu. Tú kanst leggja títt vanliga Bústaðarlán um til eitt Grønt bústaðarlán, um bústaðurin hevur grøna orkuskipan.

Lánið hevur broytiliga rentu og fasta afturgjaldstíð.

Les meira á ns.fo.



Norðoya Sparikassi
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 475000
ns@ns.fo
ns.fo
















DESIGNA KØKAR **BORG** | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO


Vit raka málið!


Tað besta omaná
Forkela familjuna. Royn okkara
leskiliga vaniljukrem.
VANILJU
KREM
Nýggj vøra!

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98

www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



HELGI HOYDAL

# HONDBÓLTSSKÚLIN VIÐ OKKARA HONDBÓLTSSTJØRNUM

*Fyriskiparar og venjarar til hondbóltsskúlan møtast áðrenn skúlin byrjar.*

## Bólturin er í góðum hondum

Umleið 300 børn úr ymsum feløgum luttóku á hondbóltsskúlanum millum jól og nýggjár, og niðurstøðan frá okkum fyriskiparum er at tað grør framvegis um gangandi fót í okkara kæra ítrótti. Tá ein hondbóltsskúli kann borðreiða við nøvnum sum Elias Ellefsen á Skipagøtu, Hákun West av Teigum, Pauli Jacobsen, Marita Mortensen, Jana og Pauli Mittún, Peter Krogh, Jónas Gunnarson Djurhuus, Brandur Halgirson, Leivur Mortensen, og Pætur Mikkjalsson so er lítið at ivast í um tað verður góð undirtøka.

Tað var spennandi at standa hesumegin ein hondbóltsskúla fyri fyrstu ferð. Eg minnist sjálvur at eg luttók á hondbóltsskúlum sum yngri, og eg hevði tað altíð stuttligt. Serliga at knýta vinabond við leikarar úr øðrum feløgum, og sjálvandi eisini at spæla hondbólt.

Hesir tveir dagarnir vóru gjørdu akkurát tað sum vit ynsktu. Børnini spældu eina rúgvu av hondbólti, umframt at tey lærdu um reglar, gjørdu fimleik og annað.

Til umleið 300 børn millum 1. og 4. flokk krevst nógv hallarpláss. Børnini ferðaðust ímillum Gundadalshøllina, Fimi, Høllina á Hálsi, Skúlan við

Løgmannabreyt, Hoyvíkshøllina og Fimleikarhøllina í Hoyvík. Kvinnuliðið og mansliðið hjá H71 vóru øll við sum leiðarar og venjarar, umframt teir flestu útisetarnir, sum leika í feløgum í Evropa.
Tað var stuttligt at síggja hvussu væl hesi børnini dugdu at spæla hondbólt, og hvussu væl tey dugdu at venja. Vit kunnu staðfesta at her koma fleiri góðir leikarar í framtíðini. Serliga eitt beit eg merki í. Tá børnini høvdu ein steðg, og børnini vóru einsamøll í høllini uttan venjara, hendi







nakað serligt. Her vórðu tey flestu spølini spæld. Tá tóku tey sjálvi leiðsluna, onkur var dómari, onkur skipaði spælið meðan hini spældu. Eina løtu í Hoyvíkshøllini helt eg meg síggja eini fimm, kanska seks ymisk spøl verða spæld, heilt uttan venjara. Tað er akkurát tað sum ger góðar leikarar, og tað sum ger hondbóltin stuttligan. Samanrenningin millum skipaða venjing við venjara, og spæl uttan venjara, er, eftir mínum tykki, akkurát tað sum vit skulu hava.

Eg vil enda við eini søgu sum eisini gjørdi meg glaðan frá hondbóltsskúlanum. Ein mamma greiddi mær frá um dóttrina, sum hevði verið í bólki saman við fleiri av sínum kappingarneytum úr hinum feløgunum úr landinum. Vanliga plaga tær at kempa harðar bardagar í dystum. Eftir ta einu venjingina spurdi tann eina gentan um hon og hendan dóttirin skuldu fara finna upp á okkurt seinni um dagin. Tað er akkurát hetta sum er ein stórur partur av hondbóltinum í Føroyum. Hóast dystirnir hava nógv at siga, so kann man finna sær vinir í øðrum feløgum eisini. Tað sum vit hava til felags er hondbólturin.























| | |
|---|---|
| 1 | Rúna Jógvansdóttir Larsen |
| 2 | Elsa Egholm |
| 4 | Brynhild Pálsdóttir |
| 5 | Vár Bentsdóttir Zachariasen |
| 6 | Bjørk Brimnes |
| 7 | Maria Halsdóttir Weyhe |
| 8 | Karin Egholm |
| 9 | Marita Mortensen |
| 11 | Lukka Arge |
| 12 | Alda av Skarði |
| 13 | Inga Maria Joensen |
| 14 | Sunniva Bogadóttir |
| 15 | Christina Turiðardóttir Arge |
| 17 | Lív Bentsdóttir Zachariasen |
| 25 | Sára Jacobsen |
| 27 | Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe |
| 29 | Poula Fríðheim Petersen |
| 77 | Jana Mittún |
| 99 | Guðrið Bogadóttir á Borg |

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjálparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Liðleiðari:** Beinta Lindberg Hansen
**Málmansvenjari:** Alexander Lein Martinsen
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen / Ingilín Holm

sms

## SMS KAPPINGIN - KVINNUR

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1.** | **H71** | **12** | **429** | **294** | **135** | **23** |
| 2. | Neistin | 12 | 347 | 271 | 76 | 18 |
| 3. | Kyndil | 12 | 381 | 295 | 86 | 17 |
| 4. | Stjørnan | 12 | 361 | 318 | 43 | 16 |
| 5. | Víf | 12 | 318 | 336 | -18 | 11 |
| 6. | Stíf | 12 | 265 | 382 | -117 | 5 |
| 7. | VB | 12 | 241 | 335 | -94 | 4 |
| 8. | EB | 12 | 272 | 383 | -111 | 2 |



1 Torstein Sivertsen
2 Sveinur Olafsson
5 Rói Seyer Hjaltason
7 Baldur Gillason
8 Tórmóður Petursson Djurhuus
9 Jón Rói Mohr Høgnesen
10 John Skaalum Vilhelm
15 Ragnar Karlsson
18 Sakir Tróndarson Frýdal
21 Høgni Højsted
23 Ári Rúnason
28 Rói Ellefsen á Skipagøtu
31 Rói Heinason Thomsen
39 Rókur Ziskason
45 Peter Krogh
50 Alexander Lein Martinsen
71 Bogi Hansen

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Petur O.Sivertsen / Hanus Mortensen

BURN FITNESS

## BURN KAPPINGIN - MENN

| Nr.: | Lið: | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Víf | 9 | 266 | 247 | 19 | 15 |
| 2. | Kíf | 9 | 268 | 247 | 21 | 14 |
| **3.** | **H71** | **10** | **281** | **276** | **5** | **11** |
| 4. | Team K. | 8 | 226 | 219 | 7 | 9 |
| 5. | Neistin | 9 | 253 | 272 | -19 | 8 |
| 6. | Stíf | 9 | 273 | 280 | -7 | 5 |
| 7. | Kyndil | 10 | 252 | 278 | -26 | 2 |

# EGINSTUÐLAR

FAROE SHIP

OGNARTÆNASTAN

Fønix

strandamáling

Eydnudeild

FØROYA TELE

PRISMA

Samverk

ADVOKATSKRIVSTOVAN

RASKA
·1977·

BILLUTIR

LAKKERING

LIMO

FIXA

PERSÓNBILAR | LASTBILAR | HÚSVOGNAR

SMYRIL LINE

polyplast

LAIDERZ

*Fokus á ítróttavøllir & breytir*

Januar

LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

bilrokt.fo

OY

Halton

ADVOKATFELAGIÐ

LBF

THE BIRD | GUESTHOUSE

SALMON PROTEINS

formula

SPEKT

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN


MAGN
BURG
ARIN
magn




Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG
SAMSKIP


ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
**www.bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**




Mynd: Gudmund Helmsdal


www.laiderz.dk


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar

FAROE SHIP


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
sendistovan
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




**Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310**
**@theathletesfoottorshavn**

mál

Et her ella tak út við

**Máltíð til børn & vaksin**

*Salatbarr* **Kaffi** *Tvíflísar*

**Smurd rundstykkir**




**Skal tú hava bindiklubb, veitslu, tiltak ella fund?** *Vit kunnu hjálpa tær. Sig bara hvussu nógv og hvar, so koma vit, tá tað er tíð til máltíð.*

Mál, Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík.
Ring ella skriva: tel. 588256, tpost christianna@mal.fo

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**

NORÐOYA SPARIKASSI

# Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo

ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




©NUDLAVIRKIÐ

hiddenfjord.com


SISU
SKORA
VIÐ
SISU


Føroya Bjór í Hoyvík
Karlamagnusarbreyt 17
Upplatingartíðir
Mánadag-Hósdag 13.00-18.00
Friggjadag 10.00-19.00
Leygardag 10.00-16.00
Sunnudag Stongt